

1982: Nýggja rotatiónspressan á Sosialurin prentar fyrsta blaðið á egnari prentsmiðju síðani 1974

Framhald av síðu 11

cobsen, bókbindari, sum hevði bókbindingarvirki í húsunum hjá Herluf Arnason, hevði fingið eina nýggja falsimaskinu, og hagar plagdu teir á Heygsbreyt at fara við blaðnum til falsingar, og síðani vóru ungfólk, sum pakkaðu blaðið og koyrdu tað á Posthúsið.

### Keypa prentsmiðjuna hjá Karbech

Í 1964 keypti Javnaðarflokkurin prentsmiðjuna frá Karbech. Villi Sørensen hevði verið blaðstjóri á Sosialinum síðani 1952 og var tað eisini framvegis, tó at hann búði í Klaksvík. Hann sendi tilfar við postinum, men tað var mangan trupult at fáa hetta og annað tilfar rættstundis, og tí arbeiddu teir mangan til langt út á kvøldið, og onkuntíð út á náttina, segði Sámal Olsen við Sosialin í 1982.

– Vit hugsaðu ikki so nógv um tað, tí tað hevði altíð verið soleiðis, at bløðini vóru skrivað um dagin og at prentararnir arbeiddu um náttina.

– Serliga minnist eg einu ferðina, vit prentaðu páskablaðið, sigur Sámal og heldur fram:

– Avgjørt var framman undan, at blaðið skuldi hava nøkur orð um páskahalguna, men tá tey skuldu í prent, setti Karbech seg vð setimaskinuna. Hann hevði einki handrit at skriva eftir, men gjørdi sjálvur orðini, sum hann setti beinleiðis. Karbech var sera kønur í føroyskum og dugdi væl at skriva, segði Sámal.

Komin upp í sjeytiárini verður farið undir ávísa útbygging av prentsmiðjuni, tá blaðið keypti eina lítla pressu, sum kallast ein veingjaautomat. henda varð nýtt til at prenta smærri prentlutir við, og var hetta seinasta prentiarbeiðið við blýggi, sum varð gjørt á prensmiðjuni á Heygsbreyt.

Í 1974 verða húsini í Sjúrðagøtu 9 keypt til blaðhús. Tá varð ásannað, at nýmótans off-sett teknikkurin var framtíðin innan blaðútgávu, og tað var ikki ráðiligt at útbyggja prentsmiðjuna á Heygsbreyt, sum hevði slitnar og ótíðarhóskandi maskinur.

Um hetta mundið verður Sosialurin prentaður á prentsmiðjuni hjá Dimmalætting, meðan alt tilgerðararbeiðið varð gjørt á Sosialinum.

### Egna prentsmiðju og nýtt blaðhús

Í mars mánaði í 1982 flytir Sosialurin í nýggju blaðhúsini á Argjum, sum eru keypt og sett í stand til endamálið. Nú fekk blaðið aftur sína egnu prentsmiðju – hesaferð eina rotatiónsprentsmiðju, sum tá kundi prenta Sosialin í upp til 24 síður.

Hetta var eitt sera stórt framstig, og nú fór blaðið frá at koma út tvær reisur um vikuna til at koma út tríggjar ferðir um vikuna. Hetta var størri avbjóðing hjá starvsfólkunum – og nú bar betur til at bera aktuellari tíðindi. Samstundis sum flutt varð út á Argjar varð navnið á blaðnum broytt, so blaðið nú kom at eita Tíðindablaðið Sosialurin. Hetta var helst fyri at leggja dent á, at blaðið var eitt tíðindablað heldur enn eitt politiskur boðberi.

Hesi 20 árini síðani 1982 er nógv hent á blaðøkinum í Føroyum. Nógv bløð, sum vóru tá, eru ikki longur, og Sosialurin er vaksin sera nógv hesi árini til í dag at standa ájavnt við Dimmalætting í støðd og útbreiðslu, meðan Dimmalætting tá var einasta nógv størsta blaðið í Føroyum.

Seinast í áttatiárunum – tá kreppan fór at kennast – máttu stig takast til tess at standa í móti minkandi inntøkunum. Í staðin fyri at repa seglini, valdi leiðslan á Sosialinum heldur at økja um útgávutalið úr trimum upp í fimm ferðir. Tá flutt var út á Argjar í 1982 vóru útgávudagarnir øktir frá tveimum til tríggjar.

Fyri at hetta skuldi kunna bera til var neyðugt at rationalisera arbeiðsgongdini. Tí vóru teldur á fyrsta sinni tiknar í brúk í blaðarbeiðinum. Keyptar vóru macintosh teldur til øll blaðfólkini og til setifólkini. Við at prenta út statsan á A-4 pappír slapst undan allari arbeiðsgongd ini við at setifólkini skuldu seta eftir manuskripti frá blaðfólki. Lím og saksur var tó framvegis í brúki, men 10 ár eftir hetta – í 1999, vóru saksur og lím endaliga pakkað niður, og verður blaðið í dag í øllum smálutum framleitt digitalt – ella »talgilt«, sum tað eitur á nýggjum máli.

### Stovna prentsmiðju saman við Dimmalætting

Í 2000 legði Sosialurin niður prentsmiðjuna á Argjum. Saman við Dimmalætting varð partafelagið Prentmiðstøðin stovnað. Tær bestu maskinurinar hjá Sosialinum og Dimmalætting vórðu settar saman, samstundis sum nýggjar maskinur vórðu keyptar. Hetta er í dag einasta rotatiónsprentsmiðja í landinum – og tískil tann einasta blaðprentsmiðjan. Henda prentsmiðja klárar uttan trupulleikar at nøkta tørvin á allari blaðprenting í Føroyum í dag. Á hesi prenstmiðju ber til at prenta Sosialin í 56 síðum, harav 16 síður við liti. Um tørvur er á størri blað ella fleiri litsíðum, so ber til at prenta blaðið í tveimum ella fleiri umførum, og tá økist síðutalið tilsvarandi.

### Sosialurin gerst heimsumfatandi

Tá Føroyar í 1996 vórðu knýttar upp í internetið, vistu vit ikki, hvussu stóra ávirkan hetta fór at fáa á blaðarbeiðið – ella miðlaarbeiði sum heild. Í 1997 fóru vit í holt við InternetSosialin, har vit á internetinum kundu lesa dagsins Sosialin. Henda skipan er støðugt útbygd og er vorðin ein alsamt meira integreraður partur av arbeiðinum hjá fólkinum á Sosialinum og útbreiðsluni av blaðnum.

Tað, at fólk alla staðni kring heimin kunnu fáa tíðindi í Sosialinum samstundis hevur stór perspektiv við sær.

Nýggi samskiftishátturin við internetinum hevur eisini lætt munandi um arbeiðið hjá blaðfólki og myndafólki okkara. Nú er lagað manni at skriva ella taka myndir hvar sum helst í landinum ella heiminum og fáa bæði tekst og myndir í blaðið beinanvegin. Soleiðis er Sosialurin eisini skipaður við deildum í Sandvík, í Klaksvík, í Saltangará umframt ta rullandi redaktiónia, og lata hesar deildir til blaðið hvønn einasta dag.

Eitt tað seinasta nýggja hjá Sosialinum er Skipssosialurin, sum er ein teldufílur, ið verður sendur sum teldupostur til fólk umborð á skipum, sum ikki hava so gott internetsamband, at tey kunnu lesa bløð á internetinum.

Í desember í fjør gjørdu Sosialurin og Føroya Tele avtalu um samstarv um tíðindi á www.olivant.fo. Á olivant verða styttri tíðindi løgd út loypandi gjøgnum allan dagin.

Allar hesar tøkniligu broytingar hava ført til eitt fjølbroytt arbeiðspláss – ið næstan kann sigast at verða pappírsleyst, um vit samanbera við støðuna bara fyri fáum árum síðani. Í dag nýtist okkum ikki at nerta pappír, fyrr enn vit skoða endaliga úrslitið, tá blaðið er prentað.



# Raðhúsini verða liðug á ólavsøku

**– Fýra sáttmálar eru undirskrivaðir, og tann seinasti er klárur til undirskrivingar, sigur Torben Nielsen, sum eigur Sp/f TN-Bygging á Glyvrum. Hann ætlar at byggja fimm raðhús aftrat beinanvegin, um nóg stórur áhugi er.**

SETHÚSABYGGING
*Vilmund Jacobsen*



Gongst Sp/f TN-Bygging sum ætlað, verða 5 raðhús bygd aftrat beint sunnanfyri hesi, sum verða liðug á ólavsøku. – Á henda hátt kunnu vit byggja 10 sethús á tveimum grundøkjum, sigur Torben Nielsen, sum eigur TN-Bygging.



Á ólavsøku í ár standa fimm raðhús liðug undir Høgaleiti í Saltangará.

Tað er Sp/f TN-Bygging, ið byggir hesi húsini, og eigari av felagnum er Torben Nielsen á Glyvrum.

Hann hevur sjey mans í arbeiði, og teir fóru undir hetta arbeiði í oktober mánaða síðsta ár.

Torben sigur, at sáttmáli er undirskrivaður um fýra av húsunum, og tann fimti sáttmálin liggur klárur til undirskrivingar.

– So, eg kann siga, at øll hesi fimm húsini eru seld, sigur hann.

### Ætlar at byggja 5 sethús aftrat

Ætlanin hjá Sp/f TN-Bygging er at byggja fimm sethús aftrat av sama slagi, sum hesi fyrru, men til tess er neyðugt, at fólk, sum vilja keypa sær eini raðhús í Saltangará, lata við seg koma. Tí hevði felagið eina lýsing í bløðunum herfyri, har hesi seinni fimm húsini vera boðin út til sølu.

– Í løtuni er telefonin meira friðarlig. Tað verður ikki ringt so nógv og spurt um hús, sigur Torben, sum ætlar, at 2. byggistig, ið fevnir um tey seinnu 5 húsini, fer í gongd til heystar.

Ætlanin er at fara undir 2. byggistig í august, soleiðis at húsini standa innilokað til jólar og liðug til várs.

– Grundøkið er ikki útgrivið, men útgravingarloyvið er klárt, sigur Torben.

### Eins uttan, ikki innan

At síggja til, eru øll húsini í røðini eins, men innan eru tey innrættað ymiskt – alt eftir ynskjunum hjá teimum, sum skulu hava húsini.

– Upprunaliga eru øll húsini eins, bæði innan og uttan, men onkur hevur valt at hava meira pláss, t.d. fleiri kømur, og tá hava vit gjørt nakrar broytingar, sum eisini dýrka húsini eitt sindur.

Torben sigur, at teir serliga hava broytt innrættingina í kjallarahæddini, har t.d. hjallurin er gjørdur til eitt kamar og kjallarin er vorðin til eitt størri sjónvarpsrúm saman við gongini.

Sniðhúsini eru í tveimum hæddum, sum hvør er 60 fermetrar netto. Í kjallaranum er durur, 2 kømur, sjónvarpsrúm,wc og fýrrúm. Í ovaru hæddini er gongd, wc, hjúnarrúm, køkur og stova.

### Undir 1 millión

– Vit siga við tey, sum spyrja, at tey næstu fimm húsini fara at kosta 975.000 krónur, soleiðis sum vit hava teknað tey. Skulu ymiskar broytingar gerast, kemur tað uppá kostnaðin, um hetta annars dýrkar um bygginguna.

Torben sigur, at tey fimm húsini, sum eru seld, kosta millum 960.000 og 990.000 krónur.

Spurdur, hví felagið hjá honum er farið í holt við at byggja raðhús, sigur Torben:

– Eg helt hetta vera eitt gott hugskot, og kommunan vísti eisini ætlanini stóran áhuga - ikki minst, tí her eru so fá grundøkir tøk.

Hann vísir á, at fleiri grundøkir verða spard við at byggja hesi raðhúsini.

– Á henda hátt kunnu vit byggja 10 sethús á fýra grundøkjum, sigur Torben Nielsen at enda.

# Stórar svartkjaftalandingar í Fuglafirði

**– Krúnborg fekk 500 tons í seinna hálinum mikukvøldið, siga tey á Havsbrún.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er nógvur svartkjaftur at fáa undir Føroyum í løtuni, og bæði Christian í Grótinum, Tróndur í Gøtu og Krúnborg hava hesa vikuna meira enn 2.000 tons hvør.

– Líkt er ikki til, at tað slitnar sundur við fiskiskapinum beint nú, siga tey á Havsbrún í Fuglafirði.

Men tey taka partvís orðini aftur í seg, tí seinasta vikuskiftið var svartkjafturin ringur at finna og lítið var at fáa.

Veðrið spælir nógv inni, og svartkjafturin ferðast skjótt.

– Tá kann tað henda, at skipini missa hann burtur og finna hann ikki aftur beinanvegin.

Og soleiðis var seinasta vikuskiftið.

– Lítið var at fáa fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin, men síðan bóru skipini við svartkjaftin aftur, siga tey í Fuglafirði.

### Tríggjar landingar

Hesa vikuna hava tríggjar stórar svartkjaftalandingar verið í Fuglafirði.

Christian í Grótinum var inni mikudagin við 2075 tonsum, Tróndur í Gøtu var hósdagin við 2100, og leygardagin fara tey at taka svartkjaftin upp úr Krúnborg, sum helst fer at hava út við 2500 tons.

Fyrr í vikuni landaði eisini Jón Sigurðsson 800 tons av svartkjafti í Fuglafirði.

Á Havsbrún vita tey annars at siga, at Krúnborg fekk 500 tons í seinna hálinum mikukvøldið.



Væntandi landar Krúnborg út við 2500 tons av svartkjafti í Fuglafirði leygardagin. Christian í Grótinum, Tróndur í Gøtu og Jón Sigurðsson hava eisini landað í vikuni.